# Broytingar í sBókini

## Nýtt snið

Nýggja sniðið fevnir m.a. um:

- **Innihald á síðunum**, t.d. tekst, myndir og talvur.
- **Samvirkið innihald**, t.d. video, kvissir og ljóð.
- **Orðafrágreiðingar**
- **Vinstrumenu**
- **Innritingarøkið**




## Nýggjar funktónir

Nýggju funktiónirnar eru m.a.:

- **Bókamerki**: Set bókamerki í sBókina, so tú lætt finnur síðuna aftur.
- **Tilfarslisti**: Fá yvirlit yvir alt tilfar í sBókini, t.d. allar kvissir, video og talvur.

- **Myrkastøða**: Vís sBókina í myrkastøðu, so tað er mildari fyri eyguni at lesa um kvøldið.
- **Fokusstøða**: Vel fokusstøðu, um tað er ov nógv á síðunum, sum órógvar lesingina.
- **sBøkur, sum tú síðst lat upp**: Snarvegur til tær sBøkur, tú vitjaði seinast.
- **Amboð til keldutilvísingar**: Ein effiktivur háttur at hála síðuupplýsingar til keldutilvísingar.
- **OSS**: Hjálp til sBókina og ymsu funktiónirnar í sBókini.

## Betraðar funktiónir

Summar kendar funktiónir verða lættari at brúka:

- **Leitifunktiónin**: Lættari at brúka og gevur betri úrslit.
- **Notufunktiónin**: Verður løgd saman við **hálýsing** og verður lættari at arbeiða við.
- **Innihaldsyvirlitið**: Ger tað lættari at finna runt í sBókini, og "Tilfarslistin" verður lagdur aftrat.
- **Deil leinki**: Skjótari og lættari at deila leinki.
- **Síðusmálutir**: Greið uppteljing av tekstsíðum og av teknum og orðum á síðunum.
- **"Sig tína hugsan"-skjal**: Verður lættari at siga tína hugsan um innihald og funktiónir.
- **Innihald og øki til læraran**: Verður savnað í innihaldsyvirlitinum.

## Funktiónir, sum hvørva

- **Favorittar** hvørva, og ístaðin kemur **sBøkur, sum tú síðst lat upp.**
- **Funktiónin "Legg í undirvísingargongd"** verður tikin úr sjálvari sBókini. Framyvir verða tilvísingar til sBókina settar inn í undirvísingargongdina, sum uttanhýsis leinki.
- **Gamla innihaldsyvirlitið** hvørvur, og nýggja innihaldsyvirlitið, sum gevur yvirlit yvir kapitlar og síður í sBókini, kemur ístaðin.

# Fimm frálíkir hentleikar

## Nýtt snið

Nýggja sniðið á sBókini ger lesiupplivingina enn betri. sBókin fær eitt breiðari format, so innihald sum tekstur, myndir og video verða størri enn í dag. Sniðið er við til at gera tilfarið lesivinarligari, atkomiligari og lættari at finna runt í.



## Persónligar ásetingar

Áset tekst og snið fyri at gera sBókina persónliga. Sum nakað nýtt kanst tú nevniliga broyta skrift, skriftstødd, umframt linju- og bókstavamillumrúm – bæði í tí einstøku sBókini og í øllum tínum sBókum. Á hendan hátt tryggjar tú, at tínar sBøkur hóska til tín máta at lesa uppá.

... og tú kanst velja myrkastøðu tínar sBøkur. Tað dempar ljósið frá skerminum, soleiðis at tað veður mildari fyri eyguni at lesa á skermi um kvøldið.




## Viðmerkingar og hálýsing

Viðmerkingar og hálýsing verða samlað í eitt amboð. Tað ger tað lættari at viðmerkja í ávísum brotum og setningum í sBókini. Amboðið er lætt at brúka, og tú hevur møguleika at marka tínar viðmerkingar við liti og øðrum tekstásetingum.

Viðmerkingarnar verða framvegis savnaðar í einum lista, har tú kanst rætta í teimum og skriva tær út.



## Brúkaravinarligt innihaldsyvirlit

Góðir snarvegir beint við.

Innihaldsyvirlitið verður lesiligari, og tað verður lættari at finna runt í sBókini. Eisini eru beinleiðis leinki til forsíðuna, kolofonina, lærarаøkið og tilfarslistan, sum gevur yvirlit yvir tøkt tilfar í sBókini, t.d. uppgávur, video, myndir og kvissir.




## Framstigsstrika

Ovast á síðuni í sBókini kemur ein framstigsstrika, sum vísir, hvussu langt tú ert komin at lesa ta síðuna. Tað ger lesiupplivingina natúrligari og gevur tær yvirlit yvir vavið á innihaldinum á síðuni.

